**SKRÁ**

**fyri vitjan hjá hennara hátign drotningini í Føroyum**
**tann 12. juni – 16. juni 2016**

## Sunnudagur 12. juni

*Flogvøllurin*

Kl. 16.00 H. H. Drotningin lendir í Vágum.

Hesi taka ímóti:
Aksel V. Johannesen løgmaður
Dan M. Knudsen ríkisumboð
Marjun Hanusardóttir løgmansstjóri
John Kølbæk landfúti
Jákup Sverri Kass flogvallarstjóri

H. H. Drotningin og løgmaður koyra til kongaskipið Dannebrog. H. H. Drotningin við fylgi fara umborð á kongaskipið Dannebrog, sum siglir víðari eftir boðum frá skipsovastanum.

## Mánadagur 13. juni í Suðuroy

*Drelnes*
*Búni: Tænastuklæði*

Kl. 09.00 Danska verjuskipið Triton og føroyska verjuskipið Brimil eru við í kongaliga fylginum undir leiðslu av skipsovastanum, áðrenn komið verður inn á Drelnes á Tvøroyri. Triton ger kongsheilsan við 27 skotum.

Føroyskir róðrarbátar og M/S Thorshavn fylgja kongaskipið Dannebrog, tá ið skipið kemur inn á Drelnes.

Kl. 09.15 Kongaskipið Dannebrog leggur at á Drelnesi við mentanarhúsið SALT.

*Móttøka á Drelnesi*

Kl. 09.30 H. H. Drotningin gongur í land.

Hesi taka ímóti á bryggjuni við SALT:
Aksel v. Johannesen løgmaður og frú Katrin D. Apol
Dan M. Knudsen ríkisumboð
Kristin Michelsen borgarstjóri og frú Joan Michelsen
Marjun Hanusardóttir løgmansstjóri.

*Vælkoma og navnakenning*

Løgmaður heldur stutta vælkomurøðu og rópar 9 ferðir hurrá fyri H. H. Drotningini.

Haldis Michelsen handar drotningini blómutyssi. Síðan spælir Tvøroyrar hornorkestur undir leiðslu av Tróndi Enni *Kong Christian* og *Tú alfagra land mítt.*

Kl. 09.45 H. H. Drotningin, løgmaður og frú, ríkisumboðið, borgarstjórin og frú, løgmansstjórin umframt restin av fylginum spáka yvir til mentanarhúsið SALT, sum verður bygt.

Ólavur Rasmussen, stjóri, tekur ímóti við dyrnar og greiðir frá um húsið.
Kórið Ljómur framførir 2 løg, tá komið verður inn í húsið.

Gingið verður uppá til komandi matstovuna, har Agnes Mols Mortensen, lívfrøðingur, greiðir stutt frá um tara. Leif Sørensen, kokkur, bjóðar brellbitar.

*Skúladepilin í Hovi*

Kl. 10.20 Koyrt verður frá SALT til Hovs.

Kl. 10.30 Komið verður til skúladepilin í Hovi.

Rigmor Dam, landsstýriskvinna í mentamálum, tekur ímóti. Saman við henni standa Ole V. Laursen, rektari og Jórun Petersen leiðari á Heilsuskúlanum.
Landsstýriskvinnan vísir skúlan fram. Í kantinuni heldur landsstýriskvinnan stutta røðu, og tað verður bjóðað brellbitar. Næmingar spæla bakgrundstónleik.

Kl. 11.10 Koyrt verður úr Hovi til Hvalbiar.

*Hvalba*

Kl. 11.30 Komið verður til Sambýlið á Óðalsbrekku í Hvalba.

Trúgvi Gudmundarson borgarstjóri og frú Jean Fríolvsdóttir taka ímóti H. H. Drotningini.

Óðin Jákupsson handar H. H. Drotningini blómutyssi.

Barbara Julsgart leiðari, Bjarndis Mortensen starvsfólk og Anna Djurhuus, leiðari fyri Bú- og Heimatænastuna greiða frá. Drotningin heilsar upp á búfólkini.

Kl. 11.50 Koyrt verður frá Sambýlinum til Roynhøllina.

Kl. 11.55 Komið verður í Roynhøll.

Trúgvi Gudmundarson, borgarstjóri, navnkennir bygdaráðið í hesi raðfylgju:

Rúni Thomsen varaborgarstjóri
Magni Bertholdsen
Martin í Nesi
Johan Eli Lyngvei Poulsen

Niels Jacob Thomsen
Eyðfinn Debes

Róin Schrøter vísir fram eina eftirgerð av hellinum í Lítlu Dímun og Eyðbjartur Skaalum visir fram eina framsýning av kolanáminum í Hvalba.

Borgarstjórin handar gávu.

Kl. 12.15 Borgarstjórin er vertur við miðmála.

Kl. 13.00 Koyrt verður úr Roynhøll til Sandvíkar.

Kl. 13.10 Komið verður til Sandvíkar, og farið verður inn á gólvið í elsta húsinum í Suðuroy.

Vónbjørt á Hólum og Rannveig Hovgaard taka ímóti H. H. Drotningini og siga søguna um húsið.

Sagt verður farvæl við Trúgva Gudmundarson, borgarstjóra, og frú Jean Fríolvsdóttir.

Kl. 13.25 Koyrt verður úr Sandvík til Tvøroyrar.

*Tvøroyri*

Kl. 13.45 H.H. Drotningin kemur til Tvøroyrar.

Tvøroyrar Hornorkestur undir leiðslu av Tróndi Enni spælir í túninum við Kgl. Einahandilin, tá bilafylgið kemur koyrandi.

Kristin Michelsen borgarstjóri og frú Joan Michelsen taka ímóti í túninum við Kgl. Einahandilin.

Borgarstjórin navnkennir býráðið í hesi raðfylgju:

Bjarni Hammer varaborgarstjóri
Jens Johannesen
Marit Poulsdóttir
Anita Vibergsdóttir
Hallur í Heiðunum
Marjun Olsen

Kl. 13.55 Borgarstjórin biður vælkomin og ber fram stutta røðu.

Kl. 14.05 Barnakór undir leiðslu av Sólrun Luid syngur tveir sangir.

Kl. 14.15 H. H. Drotningin spákar inn í Kgl. Einahandilin.

Kári Jespersen søgufrøðingur greiðir frá um bygningarnar og frá tíðini á Tvøroyri sum heild fyri 180 árum síðan.

Kl. 14.40 Spákað verður til Pakkhús 4, ið verður nýtt til ungdómshús.

Pól Arni Holm, leiðari, greiðir frá virkseminum. Ungdómur er í húsinum.

Kl. 14.55 Koyrt verður til P/f Varðin Pelagic.

*Fiskavirkið Varðin Pelagic*

Kl. 15.00 Komið verður til Varðan Pelagic.

Bogi Jacobsen, stjóri, tekur ímóti H. H. Drotningini og navnkennir leiðsluna.

Bogi Jacobsen stjóri greiðir stutt frá um virksemið í matarhøllini, handar gávu og síðan verður virkið víst fram.

Til rundsýningina eru:
H. H. Drotningini
Jytte Krag-Juel-Vind-Frijs hovfrú
Henning Fode hovskrivari
Michael Ehrenreich hovmarskal
Kim Kristensen siðameistari
Aksel V. Johannesen løgmaður og frú Katrin D. Apol
Kristin Michelsen borgarstjóri og frú Joan Michelsen
Dan M. Knudsen ríkisumboð
Marjun Hanusardóttir løgmansstjóri

Kl. 15.40 H. H. Drotningin við fylgi spáka til M/S Thorshavn, sum liggur við bryggju undir bygninginum hjá P/f Varðin Pelagic. Vitjað verður umborð.

Jóannes Eidesgaard, fyrrverandi løgmaður og formaður fyri grunnin, sum eigur skipið, tekur ímóti H. H. Drotningini. Sagt verður frá søguni hjá 75 ára gamla farinum.

Kl. 15.55 H. H. Drotningin við fylgi spákað til kongaskipið Dannebrog, sum liggur við bryggju á Tvøroyri.

Kl. 16.00 H. H. Drotningin við fylgið fara umborð á kongaskipið Dannebrog.

Kl. 18.30 H. H. Drotningin við fylgi verða heintað við kongaskipið Dannebrog av løgmanni, Aksel V. Johannesen, frú Katrin D. Apol og ríkisumboðnum Dan M. Knudsen. Koyrt verður til Seglloftið.

*Veitsludøgurði*
*Búni: Tjóðbúni/myrk klæði/kjóli niðurum knæ*

Kl. 18.35 Kristin Michelsen, borgarstjóri, og frú Joan Michelsen eru vertir við døgurða á Seglloftinum.

Borgarstjórin handar gávu.

Kl. 21.00 H. H. Drotningin við fylgi koyra frá Seglloftinum til Dannebrog.

Kl. 21.05 H. H. Drotningin við fylgi fara umborð á kongaskipið Dannebrog.

Skipað verður fyri føroyskum dansi á bryggjuni við kongaskipið Dannebrog, sum siglir av Tvøroyri.

**Týsdagur 14. juni 2016 í Havn**

*Móttøka í Havn*
*Búni: Tænastubúni*

Kl. 10.00 Kongaskipið Dannebrog kemur á Havnina og leggur at á Bursatanga.

Havnar hornorkestur spælir undir leiðslu av Ova Olsen.

Kl. 10.10 H. H. Drotningin gongur í land.

Aksel V. Johannesen løgmaður, Heðin Mortensen borgarstjóri og Dan M. Knudsen ríkisumboð biðja H. H. Drotningini vælkomna.

Kristianna Holm Rein handar drotningini blómutyssi.

Løgmaður og ríkisumboðið navnkenna føroysk og donsk embætisfólk í hesari raðfylgju:

Frú Katrin D. Apol
Frú Hjørdis Mortensen
Páll á Reynatúgvu løgtingsformaður
Marjun Hanusardóttir løgmansstjóri
Jonhard Klettheyggj løgtingsstjóri
Jógvan Fríðriksson biskupur
John Kølbæk landfúti
Henrik Møller sorinskrivari
Per Højgaard-Jensen kommandørur

Kl. 10.25 Koyrt verður út í Tinganes.

*Móttøka í Tinganesi*

Kl. 10.30 Løgmaður er vertur við móttøku.

Løgmaður, Aksel V. Johannesen, navnkennir landsstýrið í hesari raðfylgju:

Høgni Hoydal, landsstýrismaður í fiskivinnumálum
Kristina Háfoss, landsstýriskvinna í fíggjarmálum
Poul Michelsen, landsstýrismaður í uttanríkis- og vinnumálum
Henrik Old, landsstýrismaður í samferðslumálum
Eyðgunn Samuelsen, landsstýriskvinna í almannamálum
Sirið Stenberg, landsstýriskvinna í heilsu- og innlendismálum
Rigmor Dam, landsstýriskvinna í mentamálum

Okkurt leskandi verður bjóðað.

Kl. 10.55 Koyrt verður av Tinganesi niðan í løgtingið.

*Móttøka í løgtinginum*

Kl. 11.00 Komið verður til løgtingið.

Páll á Reynatúgvu, løgtingsformaður, tekur ímóti við dyrnar og navnkennir síðan formansskap løgtingsins og Jonhard Klettheyggj løgtingsstjóra í hesi raðfylgju:

Heðin Mortensen
Edmund Joensen
Jógvan á Lakjuni
Jonhard Klettheyggj, løgtingsstjóri

Løgtingsformaðurin fylgir H. H. Drotningini upp í móttøkuhølini á 1. hædd, har løgtingsformaðurin bjóðar vælkomin. Drotningin heilsar upp á løgtingslimirnar, ið eru til staðar. Okkurt leskandi verður boðið.

Løgtingsformaðurin handar gávu, og sagt verður løgtingsformanni og løgtingsstjóra farvæl.

Kl. 11.45 Fráferð úr løgtinginum.

Aksel v. Johannesen løgmaður við frú Katrin D. Apol, og Heðin Mortensen, borgarstjóri við frú Hjørdis Mortensen spáka við H. H. Drotningini eftir Mylnugøtu til nýggju trappuna í Vágsbotni.

*Almenn móttøka*

Kl. 11.50 Almenn móttøka fyri H. H. Drotningini í Tórshavnar Kommunu.

Havnar hornorkestur spælir. Borgarstjóri Heðin Mortensen og frú Hjørdis Mortensen biðja H. H. Drotningini vælkomna. Borgarstjórin navnkennir býráðslimirnar í hesi raðfylgju:

Jógvan Arge, varaborgarstjóri
Elin Lindenskov 2. varaborgarstjóri
Sjúrður Olsen
Marin Katrina Frýdal
Halla Samuelsen
Bogi Andreasen
Anfinn Brekkstein
Bjørghild Djurhuus
Helena Dam á Neystabø
Sigrun Mohr
Tróndur Sigurðsson
Jákup Dam
Bjørgfríð Ludvig kommunustjóri

Borgarstjórin heldur stutta røðu.

Xperiment framførir 2 løg og børn fáa andlitsmáling og fløgg.

Kl. 12.20 Dánjal á Neystabø og Búi Dam framføra Ævintýraferðina fyri børnunum. Tá ein sangur er framførdur spákar H. H. Drotningin við fylgi niðan í Reinsaríðið.

Kl. 12.30 Í Reinsaríðnum er framsýning við heitinum *Kongsvitjanir í Havn frá 1844-2010*. Alan Brockie hevur lagt framsýningina til rættis.

Jóan Petur Hentze, trivnaðarstjóri í Tórshavnar kommunu tekur ímóti. Mikael Viderø, tekniskur stjóri og Ingunn Eiriksdóttir, miðfyrisitingarstjóri eru til staðar. Helgi Fossadal greiðir frá framsýningini.

Kl. 12.50 Koyrt verður til Hotel Hafnia.

Kl. 13.00 Borgarstjórin er vertur við miðmála á Panorama.

Borgarstjórin handar gávu.

Kl. 14.10 Koyrt verður frá Hotel Hafnia til Østrøm.

Kl. 14.15 Komið verður til Østrøm.

Henrik Juul Hansen, stjóri, tekur ímóti H. H. Drotningini. Framsýning er av livandi modellum í føroyskum klæðum niðri undir. Majbritt Jakobsen, stjóri á Marjun Heimá greiðir frá framsýningini. Síðan verður farið uppá, har 12 teir kendastu sniðgevararnir hava framsýning. Sissal Kristiansen, sniðgevi, greiðir frá framsýningini.

Kl. 14.50 Vitjað verður í Steinprent.

Jan Andersson, ánari, tekur ímóti og greiður frá verksmiðjuni. Kinna Poulsen, kurator, greiðir frá framsýningini *Sjá tú blánar*.

Kl. 15.10 Koyrt verður til Boðanesheimið.

Kl. 15.15 H. H. Drotningin kemur til Boðanesheimið.

Eyðfríð Jacobsen stjóri tekur ímóti H. H. Drotningini. Er veðrið gott, sita fólk uttanfyri. Eyðfríð Jacobsen vísir fram strandlonina, meðan restin av fylginum fer inn í felagssalin.

H. H. Drotningin heilsar upp á búfólki í felagssalinum. Tað verður bjóðað ein drekkamuður og sungin felagssangur.

Kl. 15.55 Koyrt verður frá Boðanesheiminum til kongaskipið Dannebrog.

Kl. 16.00 H. H. Drotningin við fylgi ganga umborð á kongaskipið Dannebrog.

Kl. 16.15 Heiðursmerki verða handað umborð á Dannebrog.

Kl. 18.50 Dan M. Knudsen, ríkisumboð, heintar H. H. Drotningina við fylgi við kongaskipið Dannebrog. Koyrt verður til Norðurlandahúsið.

*Veitsludøgurði*
*Búni: Tjóðbúni/myrk klæði/síður kjóli.*

Kl. 19.00 Løgmaður er vertur við veitsludøgurða í Norðurlandahúsinum.

Løgmaður og frú Katrin D. Apol taka ímóti H. H. Drotningini. Løgmaður navnkennir Sif Gunnarsdóttir stjóra í Norðurlandahúsinum. Saranja Ellingsgaard handar H. H. Drotningini blómutyssi. Løgmaður handar gávu.

Kl. 22.30 H. H. Drotningin við fylgi koyra frá Norðurlandahúsinum til kongaskipið Dannebrog.

Kl. 22.35 Komið verður til kongaskipið Dannebrog.

Kongaskipið Dannebrog fer til Sandoyar efter boðum frá skipsovastanum.

**Mikudagur 15. juni 2016 á Sandoynni og í Havn**

*Heima á Sandi*
*Búni: Tænastubúni/skilagóð klæðir og góðir skógvar*

Kl. 09.45 H. H. Drotningin kemur til Sandoyar við kongaskipinum Dannebrog.

Drotningin verður flutt í land í skipsbátum.
Viðrar ikki verður siglt við Silju Star av Gomlurætt.

Kl. 10.00 Drotningin kemur í land.

Móttøka við Brandi Sandoy borgarstjóra og frú Anju Sandoy, Aksel V. Johannesen, løgmanni og frú Katrin. D. Apol og Dan M. Knudsen, ríkisumboð.

Borgarstjórin navnkennir bygdaráðið í hesari raðfylgju:

Eyðvarur Petersen, varaborgarstjóri
Poul Klementsen
Bárður Olsen
Lis Clementsen
Heri Jacobsen

Sissal Olsen handar drotningini blómutyssi.

Kl. 10.10 Koyrt verður til Listasavnið.

Kl. 10.15 Vitjað verður á Listasavninum.

Súsan í Jákupsstovu leiðari, tekur ímóti H. H. Drotningini.

Borgarstjórin navnkennir borgarstjórarnar á Sandoynni í hesi raðfylgju:
Gerhard Lognberg, Skopunar kommuna
Linjohn Christiansen, Skálavíkar kommuna
Jákup Martin Sørensen, Húsavíkar kommuna

Brandur Sandoy, borgarstjóri og Súsan í Jákupsstovu, savnsleiðari vísa fram tríggjar listamenn: Mykines, Frimod Joensen og Ingálvur av Reyni.

Næmingar úr musikskúlanum, Alvi Jespersen og Bogi Hentze, spæla bakgrundstónleik.

Tónleikur verður framførdur av Biritu Poulsen, operasangara, og Jósef Zachariassen klaverleikara. Kaffi verður afturvið.

Kl. 11.00 Koyrt verður til Grótvíkar.

Kl. 11.05 Komið verður til Grótvíkar.

Steðgað verður við Gívunarspor. Jógvan Nicodemussen (Jógvan í Klingruni) tekur ímóti og greiðir frá kendu søgnini um Gívrina. Síðani verður gingið oman og hugt eftir steininum, har 20 kvinnur hava bundið søgnina um Gívrina.

Lítið manskór framførir við steinin.

Kl. 11.30 Koyrt verður yvir um byrgingina.

Kl. 11.35 Komið verður til steinrenningarnar yviri í Urð.

Uni Árting, jarðfrøðingur, tekur ímóti og greiðir frá. H. H. Drotningin gongur út at hyggja eftir steinrenningunum, har viðarbular síggjast sum steinrenningar á markinum millum miðfláirnar og ovastu basaltfláirnar.

Kl. 11.50 Koyrt verður aftur til bygdina til Mølheyggjarnar.

Kl. 11.55 Steðgað verður við Mølheyggjarnar.

Símun Arge, fornfrøðingur, tekur ímóti og greiðir frá um nýggjasta útgrevsturin niðri á Sandabrekkuni, sum prógvar, at búsetingar hava verið har um ár 300.

Kl. 12.15 Koyrt verður aftur til Kirkjuna heima á Sandi.

Kl. 12.20 Komið verður til parkeringsplássið framman fyri kirkjuna heima á Sandi.

Uttanfyri heilsar H. H. Drotningin upp á bygdafólkið, skúla -og barnagarðsbørn og búfólkini á ellisheiminum á oynni.

Ronja Dam Jacobsen handar H. H. Drotningini blómutyssi.

Kl. 12.30 Koyrt verður til Slavansdal.

Kl. 12.40 Komið verður til smáttuna í Slavansdali.

Kl. 13.00 Borgarstjórin er vertur við miðmála.

Borgarstjórin handar drotningini gávu.

Kl. 14.15 Flogið verður við tyrlu úr Slavansdali til Boðanes í Havn.

KL. 14.30 Tyrlan lendir í Havn og koyrt verður til Dannebrog.

KL. 14.35 H. H. Drotningin kemur til Dannebrog.

*Búni: Pen klæði/tænastubúni*

Kl. 18.00 H.H. Drotningin er vertur fyri móttøku umborð á Kongaskipinum Dannebrog.

Tað verður kvøðið.

Kl. 20.30 Móttøkan endar.

**Hósdagur 16. juni í Havn**

Kl. 12.00 Tíðindafundur umborð á kongaskipinum Dannebrog.

Kl. 12.20 Tíðindafundurin endar og miðlarnir fara av Kongaskipinum Dannebrog.

Kl. 12. 30 Koyrt verður frá kongaskipinum Dannebrog til Ríkisumboðið.

Kl. 12.40 Ríkisumboðið er vertur fyri miðmála fyri innbodnum.

Løgmaður, borgarstjórin í Havn, biskupur, dómarin, politimeistaranin v.m.

Kl. 14.00 Koyrt verður til flogvøllin.